## Italia hekk í klønum trá

Italia var í ringum skørum í dystinum móti Australia. Tíðliga í seinna hálvleiki varð Marco Materazzi rikin av vølli, hóast flestu sjónvarpshyggjarar mundu vera samd um, at talan bert var um gult kort.

Australia megnaði tó ikki at avgera dystin, men við 11 móti 10 tóktust teir stevna móti longdari spælitíð. Móti dystarenda rak Grosso tó inn í brotsteigin, og har eydnaðist tað honum at detta um Lucas Neil, soleiðis at dómarin gav brotsspark. Hetta setti Totti í kassan, og so er Italia klárt til tey seinastu átta.

**-mørk**

## Ukraina hevði nervarnar

Føroyar hava higartil tvær av átta teimum sterkastu fótbóltstjóðunum í heiminum í sínum bólki. Og heilt víst eina av fýra teimum sterkastu, kundi verið lagt afturat.

Ukraina vann seg í gjárkvøldi í 1/8-finaluna móti Italia, eftir at teir vunnu brotssparkskapping móti Sveis.

Við tveimum liðum, sum bæði hava tolsemi og kontrafótbólt sum fremstu dygdirnar, var málleysi javnleikurin kanska ikki so óvæntaður. Heldur einki mál kom í longdu leiktíðini, og so mátu brotsspørk til.

Her misnýtti Shevchenko fyrstu royndina, men síðani vendi alt rætta vegin hjá Ukraina, Sveis megnaði ikki at skora upp á nakra av sínum royndum.

**-mørk**

# Ólavsøkumálið er longu rokkið

**Í góða gamla stílinum smurdi Jarnbardur bátarnar av, sum á trimum teimum fyrstu stevnunum hava kappats um fremsta plássið**

6-MANNAFØR KVINNUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað verður nógv roknað eftir Jóansøkuna. Stóri spurningurin er, hvørjir møguleikarnir eru hjá Jarnbardi at vinna FM heitið, sum tær hava vunnið tvey tey seinastu árini, og sum Jarnbardur hevur átt níggju av fimtan teimum seinastu árunum.

Talan er so at siga um millumár hjá óføru manningini, sum ikki hevur havt serligar møguleikar at venja saman, tí fleiri teirra hava verið burturstaddar.

Í Klaksvík og Kollafirði luttók báturin við skiftandi manningum fyri at varðveita møguleikan at røkka málinum, sum tær høvdu sett sær. Málið var at vinna á Ólavsøku. Tað skuldi gerast, tá ið fleiri av teimum, sum undanfarnu árini hava róð við, vóru komnar av flatlondum.

Á Skálafjørðinum og á Vágsfirði róði Jarnbardur við somu manning, og leygardagin rukku tær málinum, sum tær høvdu sett sær at vinna á Ólavsøku.

Jarnbardur legði bragdliga fyri, og tað sást skjótt, at hetta fór at verða, sum tað plagdi at vera. Fremsta plássið var ongantíð hótt, og á málinum var Jarnbardur hálva bátslongd undan Riddaranum, sum var fremstur bæði á Eystanstevnu og Norðoyastevnu. Riddarin var meiri enn eina bátslongd frammanfyri Lóm, sum vann á Kollafirði, og sum í hinum báðum kappingunum var næstfremstur.

At tað gekk so væl hjá Jarnbardi bar við sær, at Smyril, sum í trimum teimum fyrstu kappingunum var nummar trý, hesa ferð varð trýstur aftur á fjórða plássið. Hann var stóra hálva bátslongd aftanfyri Lóm og væl frammanfyri Hvessing.

Á Norðoyastevnu hevði Jarnbardur somu tíð sum Smyril á triðja plássi. Báðir bátarnir fingu ta ferðina fýra stig. Fjórðu plássini á Kollafirði og Skálafjørðinum bóru við sær, at Jarnbardur undan Jóansøkuni hevði tíggju stig. Nú sprakk Jarnbardur upp á seytjan stig. Spurningurin er so, um tað fer at bera honum til at vinna FM.

Um Jarnbardur eisini verður fremstur í teimum trimum róðrunum, sum eru eftir, so endar hann á 38 stigum. Riddarin hevur 24 stig, og um hann verður nærstfremstur í øllum hesum trimum kappingunum, so fer kontan hjá teimum í Miðvági á Ólavsøku at standa á 39 stigum!

Umborð á Jarnbardi hava tær fokus á næstu avbjóðingini, sum verður á Fjarðastevnu annan leygardag. Um tað, sum ikki hevur kenst møguligt skal gerast til veruleika og Jarnbardur harvið fer at endurtaka FM heitið, so skal Lómur syrgja fyri í hvussu so er eina ferð at koma fyrr á mál enn Riddarin. Um Riddarin megnar í hvussu so er at leggja ein sigur aftur at teimum báðum, sum tær í Miðvági longu hava vunnið, so verður tað torført hjá øðrum at vinna FM.

Umborð á Jarnbardi fegnast tær. Longu nú hava tær rokkið málinum, sum tær settu sær fyri at vinna á Ólavsøku!



*Jarnbardur er nú aftur í oddinum. Sigurin á jóansøku bendir á, at báturin kanska kann gerast ein veruliga hóttan í FM-stríðnum* *Mynd: Álvur*

**6 mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 1 Jarnbardur | 05:09.21 |
| 2 Riddarin | 05:11.14 |
| 3 Lómur | 05:15.14 |
| 4 Smyril | 05:17.20 |
| 5 Hvessingur | 05:22.10 |

# Fremstu bátarnir eru ódrúgvir

**Úrslitini á Jóansøku bera við sær, at tað fyri fyrstu ferð síðani 2003 ikki verður nøkur manning, sum fer at fáa fulla úrtøku í hesum róðrarárinum**

KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Jóansøkan vendi upp og niður upp á úrslitini, tá ið vinnararnir verða sammettir við bátarnar, sum vunnu á Eystanstevnu.

Í teimum sjey FM kappingunum var tað bara í tí eina førinum, at sami bátur vann bæði á Skálafjørðinum og á Vágsfirði. Dreingirnir umborð á 5-mannafarinum Rituni norðan úr Sundi vóru bestir á Skálafjørðinum, og teir vunnu aftur í Vági.

Í øllum hinum kappingunum var talan um annan vinnara enn á Skálafjørðinum. Riddarin úr Miðvági vann kappingina millum 6-mannafør við kvinnum á Skálafjørðinum. Hesa ferð var Jarnbardur bestur.

Hetta var fyrsta ferðin, at Jarnbardur við kvinnum vann í ár. Tey bæði undanfarnu árini vunnu kvinnurnar umborð á Jarnbardi allar sjey róðrarnar. Í fjør vann eisini 8-mannafarið Nevið Reyða allar sjey FM róðrarnar.

Í fyrraárið vóru kvinnurnar umborð á Jarnbardi tær einastu, sum vunnu allar róðrarnar. Í 2003 var tað, sum tað er í ár. Eingin manning vann allar róðrarnar. Næst við var 8-mannafarið Ørvur. Teir vunnu seks teir fyrstu róðrarnar. Á Ólavsøku mistu teir fremsta plássið, sum Kvívíkingur streyk avstað við. Ørvur varð nummar tvey á Ólavsøku, og úrtøkan var tískil 47 stig fyri tað róðrarárið.

### Einki vestur í Vágar

Á Eystanstevnu vunnu bátar vestan úr Vágum allar tríggjar kappingarnar millum kvinnumanningarnar. Umframt Riddaran úr Miðvági, sum hesa ferð noyddist at lúta fyri Jarnbardi, vann Ørnin úr Sandavági róðurin millum 5-mannafør við kvinnum á Eystanstevnu og Frúgvin úr Miðvági genturóðurin. Hesa ferð noyddust hesir bátarnir at lúta. Ørnin, sum hevði vunnið tríggjar tær fyrstu ferðirnar, noyddist at lúta fyri Sílinum, og Frúgvin noyddist at lúta fyri Havfrúnni.

Felagið, sum stóð seg best av øllum í Vági, var Kappróðrarfelagið NSÍ. Eftir vónbrotið í heimasjógvi, tá ið eingin manning hjá hesum felagnum vann, vóru teir aftur fremstir í tveimum kappingum. Sølmundur var frammanfyri Sundabátin, og fram um alt hevði tað týdning fyri Kappróðrarfelagið NSÍ, at tað eydnaðist Eysturoyingi at vinna, eftir at flaggskipið hjá eysturoyingum so at siga ikki tók lut í kappingini, tá ið teir skuldu royna seg í heimasjógvi.

Knørrur kiksaði á Skálafjørðinum, eftir at hann hevði vunnið tvær tær fyrstu ferðirnar. Hesa ferð settu teir umborð á Knørri Ørv, sum vann á Skálafjørðinum, so rudduliga upp á pláss.

### FM favorittar

Dreingirnir umborð á Rituni hava vunnið tríggjar tær seinastu ferðirnar, og teir eru greiðir favorittar at vinna FM.

Knørrur má roknast sum favorittur at vinna kappingina millum 8-mannaførini, og Sølmundur er eftir tríggjar ferðir fulla úrtøku favorittur í kappingini millum 6-mannaførini við monnum.

Í hinum kappingunum er tað so mikið tætt og úrslitini so mikið óstøðug, at tað illa ber til at vísa á upplagdan FM kandidat.

Ofta hevur tað verið soleiðis, at bátar so at siga hava tryggjað sær FM heitið í triði síðstu kappingini. Hon verður á Fjarðarstevnu í Vestmanna annan leygardag, 8. juli. So verður róð á Vestanstevnu í Sandavági 15. juli. Tað tykist vera góður møguleiki fyri, at fleiri kappingar ikki fara at verða avgjørdar fyrrenn í ólavsøkuróðrinum á Havnarvág ólavsøkuaftan 28. juli.